# Øðrvísi at byggja kirkju



*Arbeiðsmenninir hjá Articon, sum hava bygt Hoyvíkar kirkju. Tilsamans hevur byggifyritøkan brúkt 50-60.000 tímar upp á kirkjuna*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*- Eitt slíkt bygningsverk kann ikki reisast á føtur uttan við góðum samstarvi millum allar partar, segði Jákup Símun Simonsen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Hetta er ein av teimum døgunum, tá vit hugnaliga kunnu steðga á, rætta ryggin og njóta tað verk, vit í felag hava skapt, sigur Jón Danielsen, stjóri í Artikon**

**HOYVÍKAR KIRKJA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jón Danielsen, stjóri í Articon, segði við løtuna í Hoyvíkar kirkju í morgun, at hetta er ein merkisdagur fyri felagið.

- Tað er við sorgblídni, gleði og ikki sørt av stoltleika, at vit í Articon – starvsfólk og leiðsla –handa tykkum í kirkjuráðnum lyklarnar til nýggju Hoyvíkar kirkju.

Hann segði, at hetta er ein av døgunum, tá tú hugnaliga kanst steðga á, rætta ryggin og njóta tað verk, sum er skapt í felag millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara.

- At hetta er eitt felags avrik, ber lidna kirkjan boð um. Slík avrit verða ikki framd í sjálvdrátti, men bert við góðum samstarvi millum allar partar. Við samstarvi, siðiligheit, nærlagni og ýdni frá øllum pørtum, hava vit við okkara starvsfólki saman við byggiharra, byggileiðara, arkitektum, ráðgevum, okkara undirarbeiðstakarum og starvsfólki teirra nátt at kalla øll teimum málsetningum, sum vit fyri umleið tveimum árum síðan settu okkum.

Jón Danielsen segði, at alt hetta kemur ikki av sær sjálvum, men bert við virðing fyri hvørjum øðrum og teirri uppgávu, sum partarnir í felag hava sett sær fyri.

- Jú, tað er munur á at byggja eina kirkju og eitt nú ein goymslubygning.

Jón Danielsen sigur, at tað hevur verið nakað serligt at byggja eina kirkju.

- Tað er langt ímillum, at kirkjur verða bygdar í Føroyum, og eg má ásanna, at hetta hevur verið ein serlig – men sera áhugaverd – uppgáva, sigur stjórin í Articon.

- Vit hava brúkt nógva tíð upp á hetta, legði hann aftrat.

Albert vísti á, at kirkjan er umskapað nakað, og hon er væl størri í dag, enn hon var upprunaliga.

- Kirkjan er eisini flutt. Upprunaliga skuldi hon byggjast, har Oasan er bygd, men í staðin bleiv kirkjan í Hoyvík ein torgkirkja.

Arkitekturin segði, at samstarvið við bygginevndina og teir, sum hava bygt kirkjuna, hevur verið fyrimyndarligt.

- Jú, hetta er ein veldigur dagur fyri okkum.

Albert Isfeldt ásannaði, at tá ið kirkjuklokkan kom upp at hanga, og tey fyrstu ljóðini hoyrdust úr henni, rann veruliga upp fyri honum, at hetta var ein kirkja.

- Eg vil siga, at hetta var ein rørandi løta, tí líkasum tástaðni fataði tú, at hetta var ein kirkja, legði hann aftrat.

## Kirkjutænarar í Hoyvíkar kirkju:

**Deknar:**
Ólavur Skipagøta
Martin Joensen
Annika Højgaard
Birgit Arge

**Klokkarar:**
Carl Mikkelsen
Per Hansen
Snorri Brend
Petur Skeel Dahl

**Organistur:**
Oddvør Johansen



*Hoyvíkar kirkja er eitt meistarligt bygningsverk*
*Mynd: Jens Kr. Vang*